HEILSUMÁLARÁÐIÐ

*Tíðindaskriv*

**Enn fleiri tilburðir av H1N1 staðfestir í seinastuni**

Nú hava íalt 44 fólk fingið staðfest krímsjúkuna H1N1 í Føroyum. Talið av staðfestum tilburðum er sostatt vaksið nógv seinastu vikuna.

Síðani sunnudagin hava føroysku heilsumyndugleikarnir staðfest 15 nýggjar tilburðir av Influensu A (H1N1). Ein tilburður var staðfestur mánadagin, nýggju týsdagin og fimm mikudagin. Tilsamans hava 44 fólk fingið staðfest beinkrímið í Føroyum.

Hóast fleiri hava fingið staðfest H1N1 í Føroyum, so meta heilsumyndugleikarnir sum heild ikki, at fólk eiga at vera stúrin. Alt bendir framvegis á, at talan er um eina milda krímsjúku, ið hasar av eftir fáum døgum. Tó eru nakrir vandabólkar, ið eiga at vera serliga ansin.

**Serligir vandabólkar**
Hevur tú niðursett lungavirkni, astma, hjartasjúku, diabetes ella niðursetta immunverju, skal tú verða serliga ansin. Um so er skal tú seta teg í samband við egnan lækna, um tú ella onkur í húsinum fáa influensa.

Barnakonur, sum fáa influensusjúkueyðkenni, og foreldur at børnum undir 2 ár við influensueyðkennum, eiga eisini at seta seg í samband við lækna.

**Sjúkueyðkenni**
Sjúkueyðkennini eru knappliga íkomin sjúka við yvir 38˚ Celsius, sjúkueyðkenni frá andaleið (vanliga ilt í hálsi og hosti) og pína í vøddum. Leyst lív kemur fyri.

**Góð ráð**
Í samband við at H1N1 krímsjúkan av álvara hevur fingið fastatøkur í Føroyum, hava heilsu-myndugleikarnir latið úr hondum eina leiðbeining við góðum ráðum. Í komandi viku verða settar upp plakatir við góðu ráðunum á ymsum almennum støðum, so sum skúlum, dagstovnum, kommunulæknaviðtalum, sjúkrahúsum, røktarheimum. Góðu ráðini eru:

- **Vaska hendurnar ofta**
  Influensavirus setir seg á hendurnar og spjaðir seg við hondheilsan og av hurðahondtøkum. Tí verður rátt til at vaska hendurnar ofta og við sápu.

- **Hosta ella njósa í ermuna**
  Influensavirus smittar, sum smáir dropar frá hosta, njósa og líknandi. Legg útyvir munnin og nøsina, tá tú hostar ella njósar. Nýt einnýtis lummaklút ella ermuna í staðin fyri hondina.

- **Verð heima, um tú ert sjúk/ur**
  Influensa spjaðir seg skjótt í skúlum, á arbeiðsplássum og stovnum. Ring til lækna í staðin fyri at møta upp í bíðirúminum ella á sjúkrahúsinum.

Far ikki til fólk, ið eru sjúk, uttan neyðug ørindi. Gerst tú sjúk/ur, so verð heima. Gongdin við krímsjúkuni er mild hjá teimum flestu og er av eftir fáum døgum í songini. Kennir tú teg serliga ússaligan, ring so til lækna ella læknavakt

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 354045 • E-mail: hmr@hmr.fo

Influensa A (H1N1) er eitt nýtt virus, sum upp á stutta tíð hevur spjatt seg um allan heimin. Í allar flestu førum er sjúkan mild og hæsar av eftir fáum døgum. Kortini er tað týdningarmikið at avmarka smittuna.

Les meira um Influensu A (H1N1) á www.hmr.fo og www.sst.dk, og www.ssi.dk.

Landslæknin og Heilsumálaráðið 7. august 2009

*Yvirlit hjálagt*

Hjálagt er yvirlit yvir hvussu nógv fólk eru kannaði og hvussu nógv eru staðfest H1N1 positiv síðan 15. juli. Yvirlitið fevnir um tær kanningar, ið Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur gjørt. Aftrat hesum skulu leggjast teir 8 tilburðirnir, ið vóru staðfestir á Statens Serums Institut.

